# Kósin virkað meiri fisk enn vanligt

**Kósavirkið í Klaksvík hevur í mai mánaði virkað 400 tons meiri enn í farna mánaði**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

Kósavirkið í Klaksvík hevur havt úr at gera, meðan verkfallið hevur lagt bein fyri nógvum av hinum fiskavirkjunum í landinum.

Arbeiðarafeløgini í Klaksvík gjørdu sáttmála við arbeiðsgevararnar fyri trimum vikum síðani, og tí hevur verkfallið ikki órógvað arbeiðið á Kósavirkinum.

– Vit hava arbeitt millum 200 og 250 tons um vikuna, og vit koma helst upp á 1000 tons hendan mánaðin, sigur Adrian Dalsá, stjóri á Kósini.

Í farna mánaði virkaði Kósin 600 tons, og tí er talan um fittan vøkstur. Eisini tá sammett verður við árstíðina, hevur Kósin havt munandi meiri at gjørt hendan mánaðin.

## Rímuligan prís

Hóast lítil kapping hevur verið um fiskin, hevur Kósin roynt at latið hampuligan prís.

– Vit halda okkum hava latið rímiligan prís, tí tað loysir seg ikki hjá okkum at trýsta prísin í botn. Vit skulu jú liva víðari eftir verkfallið, sigur Adrian Dalsá.

– Vit kundu havt misbrúkt støðuna, men tað halda vit okkum ikki hava gjørt.

Farnu vikurnar hevur Kósin fingið ráværuna bíligari enn vanligt er, og tað er gott ískoyti til raksturin av virkinum, hóast lønirnar fóru upp fyri trimum vikum síðani.

# Nógvur fiskur á uppboðssøluni

**Fiskamarknaðurin í Klaksvík hevur havt nógv at gera verkfalsvikurnar**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Fiskamarknaður Føroya í Klaksvík hevur havt nógv at gera farnu vikurnar, meðan verkfall hevur verið í stórum parti av landinum.

Ávísir bátar hava verið oftari í Klaksvík og landa, enn teir plaga at verða.

– Vit hava ikki tikið ímóti nógv meiri fiski, enn vit plaga at gera, men býtið hevur verið øðrvísi. Stóru útróðrarbátarnir í Klaksvík hava ligið, meðan trolbátar og aðrir hava landað her, sigur Kristian Fríðrik Olsen, leiðari á Fiskamarknaðinum í Klaksvík.

Kósin hevur verið størsti keyparin farnu vikurnar, tí har hevur einki verkfall órógvað. Okkurt er selt um telefonina, men tað mesta er farið til Kósina, sum er granni hjá Fiskamarknaðinum.

Uppboðssølan í Klaksvík hevur farnu tríggjar vikurnar havt meiri at gera við at pakka fyri útflytarar.

# Vilja hava vegin gjøgnum bygdina

**Fólk á Syðradali stríðast fyri at fáa veg frá ferjuleguni til bygdina, men higartil hevur Landsverkfrøðingurin ikki vilja broytt sína ætlan um at gera verandi veg í stand**

ÚTOYGGJ
*Eyðun Klakstein*



**Kalsoy:** Fólk á Syðradali vilja hava veg frá ferjuleguni til bygdina og síðani norður í oynna. Men enn hevur ikki borið til at sannført Landsverkfrøðingin um, at hetta er betri loysn enn at breiðka gamla vegin.

Útoyggjaálitið viðger vegin á Syðradali, og í hesum áliti verður staðfest, at vegurin hevur alstóran týdning fyri bygdina.

Gamli vegurin liggur norður í Knúksdal, sum er hálva leið til Húsar. Skal ferðsla av Syðradali og oman á ferjuleguna má leiðin leggjast norður í Knúksdal og síðani suðureftir gamla vegnum.

Hetta er langur teinur at koyra, og fólk í Kalsoynni eru samd um, at best hevði verið, um nýggjur vegur varð gjørdur gjøgnum bygdina og síðani norður í oynna.

## Sakna samstarv

Í Útoyggjaálitinum, sum kom fyrr í ár, verður mælt til, at vegur verður gjørdur gjøgnum bygdina, men bara eina viku eftir at álitið var komið, fór Landsverkfrøðingurin undir at breiðka gamla vegin.

– Tá Útoyggjaálitið kom, vónaðu vit, at tað fór at gera mun og at betra um støðuna hjá útoyggjunum, men soleiðis er ikki í hesum føri, sigur Paulina Eliasen, sum er útoyggjaumboð í Húsa kommunu.

– Vit sakna samstarv við Landsverkfrøðingin, tí hjá okkum er eingin ivi um, at vegurin skal liggja gjøgnum bygdina. Tað er besta loysn fyri okkum og oynna, sigur Paulina Eliasen. Verkfallið gjørdi, at arbeiðið at breiðka gamla vegin steðgaði, og seinastu vikurnar hava fólk á Syðradali havt nógv samband við Landsverkfrøðingini og politikarar fyri at fáa broytt ætlanina hjá Landsverkfrøðinginum.

Men enn vita tey ikki, um hetta hevur eydnast. Á Syðradali bíða tey tí spent eftir, um Landsverkfrøðingurin nú fer at seta gongd á arbeiðið við gamla vegnum aftur, ella um ætlanin verður broytt soleiðis, sum bygdafólkið vil hava hana.

# All that Rain nógv at gera

**Fløguaktuelli rockbólkurin fer at spæla nógv komandi vikurnar, og teir verða afturvendandi navn til dansir og konsertir í summar**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Við eini nýggjari fløguútgávu í bakinum fer føroyski rockbólkurin, All that Rain, at spæla kring landið næstu vikurnar.

Bólkurin er sera væl dámdur sum dansi- og konsertbólkur, og teir verða eitt heitt navn komandi vikurnar – bæði til summarstevnurnar og onnur tiltøk.

Fríggjadagin kom nýggja fløga teirra, The Naked Truth, út, og hon hevur fingið góða móttøku – bæði í loftmiðlunum og í fløgubúðunum.

Leygarkvøldið spældi All that Rain beinleiðis í Útvarpi Føroya úr Studio Pegasus í Klaksvík. Hetta var í sendingini Leygarkvøld, sum var á skránni fyri seinastu ferð fyribils. All that Rain framførdu tríggjar sangir av nýggju fløguni í Útvarpinum, og hetta riggaði sera væl.

Bólkurin hevur nú eisini fingið sína egna heimasíðu, sum er at finna á adressuni allthatrain.com. Har ber til at lesa ymiskt um bólkin og nýggju útgávuna.



*All that Rain spældu leygarkvøldið beinleiðis í Útvarpi Føroya úr Studio Pegasus í Klaksvík*






Karl Johansen um verkfallið:

# Ikki stríðið vert í mun til kostnaðin

**Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, Karl Johansen, heldur, at verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag ikki var stríðið vert, tí tað hevur kostað ov mikið**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*

– Eg havi onga viðmerking til semjuna, er tað fyrsta Karl Johansen sigur, tá hann verður spurdur um sína meting av semjuni, sum varð undirskrivað mánamorgunin millum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag ørðumegin og Føroya Arbeiðsgevarafelag hinumegin.

– Sum eg havi skilt tað, so skulu øll fáa tað sama, sigur Karl Johansen. Tá sipar hann til, at Jan Mortensen í Útvarpi Føroya mánamorgunin sigur, at arbeiðsgevararnir fara at umhugsa at geva somu løn um alt landið. Tað skilst, at allir arbeiðsgevarar fara at lata somu løn til limirnar í teimum ymsu feløgunum.



*Karl Johansen heldur ikki, at verkfallið var stríðið vert, tí tað var ov kostnaðarmikið*

Semjan millum arbeiðsgevararnar og Føroya Arbeiðarafelag inniber, at starvsaldur verður innførdur á arbeiðsmarknaðinum fyri limir í FA og Havnar Arbeiðskvinnufelagi.
Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelagi, heldur tað vera sjálvsagt, at allir arbeiðarar skulu fáa somu løn, um teir eru í Klaksvík, Havn ella aðrastaðni.

– Tað, sum hini arbeiðarafeløgini hava fingið, skulu vit eisini hava, sigur Karl.

– Um tað verður ójavni millum feløgini, so fer tað at hevna seg til næstu sáttmálasamráðingar. Tað verður ballada við næstu samráðingar, um vit ikki fáa tað sama sum hini feløgini, staðfestir Karl Johansen, ið leggur afturat, at hóast talan ikki er um nógvan pening, so er tað prinsippið, ið telur.

Havnar Arbeiðsmannafelag og arbeiðarafeløgini í Klaksvík skrivaðu undir eina semju við arbeiðsgevararnar, áðrenn hini feløgini fóru í verkfall. Tí hava tey ikki verið í verkfalli.

## Ikki vert stríðið

Karl Johansen metir ikki, at fakfeløgini í verkfalli hava fingið nóg nógv burturúr, tá hugsað verður um, hvussu høgur kostnaðurin hevur verið. Hann metir sostatt ikki, at verkfallið var vert hetta stríðið, sum tað størsta arbeiðarafelagið er farið ígjøgnum.

– Nei, eg haldi ikki, at hetta verkfallið var stríðið vert, tí tað hevur kostað nógvan pening bæði fyri arbeiðarafeløgini og fyri landið sum heild. Tað er ikki smávegis, sum hetta verkfallið hevur kostað, og tað kostaði nógv fyri allar partar, slær Karl fast.

Hóast Ingeborg fekk starvsaldurin við í sín sáttmála, so iðrar Karl Johansen seg ikki um, at hansara felag skrivaði undir saman við klaksvíkingum. Tað vóru fimtan fólk, ið skrivaðu undir semjuna, fimm úr Havn og tíggju úr Klaksvík.

Nú hevur Ingeborg aftur fingið betri sømdir enn arbeiðarafeløgini í Havn og í Klaksvík, men Karl er ikki illa við av at liggja aftanfyri.

– Um vit fáa tað sama sum hini, so er tað einki flovisligt fyri okkum, tí so fáa vit tað bara av sær sjálvum.

Karl sigur seg einki kunna gera við, at tað eru FA og FAK, sum hava brotið ígjøgnum, tí hasum stýra arbeiðsgevararnir.

## Sær ongan loysn

Formaðurin hjá arbeiðsmonnum í Havn sær onga loysn á trupulleikunum millum tey stóru arbeiðarafeløgini í Føroyum. Hann veit heldur ikki enn, um talan verður um at samráðast saman næstu ferð um tvey ár.

Karl Johansen heldur tó ikki, at føroyska arbeiðararørslan stendur veikari, nú hon gongur í tveimum bólkum, tá persónarnir, ið standa á odda, Ingeborg Vinther og Karl Johansen eru so ógvuliga ósamd.

# Friðarligt vikuskifti

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í høvuðsstaðnum sigur frá friðarligum vikuskifti. Nøkur herverk vóru at taka sær av. Rútar í bygingum vóru knústir, og ein bilur í Eysturbýnum var eisini fyri herverki. Herverkið hevði einki endamál enn bara at bróta okkurt. Nøkur smávegis ferðsluóhapp hava eisini verið, har tann materielli skaðin var lítil.

Ein persónur var tikin fyri at koyra við kenning. Innihaldið av alkoholi í blóðinum var 2 promillu, og tí fær førarin eina treytaleysa frádøming av koyrikortinum. Um promillan er yvir 0,8 so er talan um treytaleysa frádøming. Er hon ímillum 0,5 og 0,8 er talan um treytaða frádøming.

Fýra persónar vóru á støðini og svóvu rúsin av sær.

Løgreglan gjørdi eisini paragraf 13 kanningar fríggjakvøldið, har eini tjúgu bilar vórðu steðgaðir, men eingin var skrivaður upp.

# Summarstevna á Svangaskarði

**Árliga summarstevnan hjá Javnaðarflokkinum verður vikuskiftið 15. og 16. juni**

POLITIKKUR
**Javnaðarflokkurin**

Árliga summarstevnan hjá Javnaðarflokkinum verður á Svangaskarði 15. og 16. juni. Tað er Eysturoyar Javnaðarfelag, sum er høvuðsfyrireikari til hesa sera fjølbroyttu stevnu.

Fríggjakvøldið 15. juni kl. 19.30 verður kvøldseta í samkomuhølunum á Svangaskarði. Á skránni verður tónleikur og sangur av ymsum slag, og fer eitt nú Petur Eli Mikkelsen at hugleiða. Petur Eli Mikkelsen er tikin úr leikum sum frásøgumaður.

Leygarmorgunin 16. juni kl 9.00 verður farið av Svangaskarði útferð út á Eystnes. Viðrar ikki, verður ístaðin farið í bussi til Gjáar. Máltíð verður etin á útferðini.

Klokkan 17 verður fólkafundur við Toftavatn, har m.a. Jóannes Eidesgaard og Jansy Olsen tala. Viðrar ikki, verður fundurin innandura á Svangaskarði.

Um kvøldið verður veitsla á Svangaskarði.

Møguleiki er at gista í húsunum á ítróttarøkinum.
Fyrireikararnir vóna, at javnaðarfólk úr øllum landinum sum vanligt koma fjølment til tiltakið.
Lýsing kemur í blaðið seinni við endaligu skránni, sigur Javnaðarflokkurin í tíðindaskrivi

